MARKNAÐARRÁK VIKA 24 2007

## LÍTIL LÆKKING — SUM VANLIGT

Alheims partabrøv lækkaðu um 3% í farnu viku. Smærru marknaðirnir, sum til dømis tann danski, lækkaðu um 4%. Smærru marknaðirnir flyta seg vanliga meir enn teir stóru, bæði upp og niður. Sum vanligt, tá partabrøv lækka eitt sindur, hevur nógv verið at hoyrt um tað í miðlunum. Mánadagin 11. juni hækkaðu partabrøv aftur umleið 1%. Tað er enn ov tíðliga at siga, at partabrøv ikki fara at lække meira í hesum umfari, men ein 3% lækking eina viku er sum útgangsstøði einki óvanligt. Hetta er ofta hent, hesi seinastu 4 árini, sum hetta uppsvingið í partabrøvum higartil hevur varað. Hetta er ikki ein korrektión, tá skal meira til. Alheims partabrøv kunnu eisini lækka 2%-3% aftrat, uttan at talan er um nevnisverda korrektión í marknaðinum.

## DOLLARIN STYRKNAÐI

Marknaðirnir vænta ikki at amerikanski tjóðbankin fer at lækka rentuna fyrr enn móti endanum av 2008, orsaka av góðum álitistølum ið endurspegla optimismu um amerikanskan búskaparvøkstur. Dollarin hækkaði til 5,58, nú hugaligari er hjá íleggjarum at fíggja amerikanska lántøku, orsakað av hægri rentuni. Bretski tjóðbankin heldur fast um, at neyðugt kann verða við fleiri rentuhækkingum í ár, hóast lækkandi prísvøkstur. Hetta fekk pundið at hækka til 11,00. Pundið hevur verið støðugt seinastu tríggjar mánaðarnar og bert sveiggjað umleið 1,25% millum 10,90 og 11,036.

## LÁNSBRÆVARENTUR HÆKKA ENN

Lánsbrævarenturnar rukku nýggjum hæddum í farnu viku. 10-ára rentan var uppi á 4,68%, sum er tað hægsta síðan 2002. Væntandi verður tor-ført at fáa hana munandi longur upp í bræði.

## HESA VIKUNA

Øll eygu verða havd við partabrøvunum hesa vikuna. Eftir lækkingarnar í farnu viku nærkast partabrøv flestu staðni á týdningarmiklum stigum. Tey kunnu tó lækka 2%-3% aftrat, uttan at talan er um nakra serliga korrektión í marknaðinum.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1423,27 | -2,94% |
| Alheims partabrøv | 8870,15 | -1,47% |
| Atlantic Petroleum | 1151,00 | -2,04% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,43 | -0,53% |
| USD | 557,46 | + 0,98% |
| JPY | 4,58 | + 1,01% |
| GBP | 1097,70 | -0,15% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK



# Starvslýsing - endurlýsing

## Leiðari til Sosialu deild hjá Porkeris- og Vágs kommunu

**Ert tú sosialráðgevi av fullum huga?**

Kundi tú hugsað tær avgerandi ávirkan á, hvussu sosialu viðurskiftini í Porkeris og Vágs kommunu verða skipað í framtíðini?

Porkeris- og Vágs kommuna hava samtykt, at seta eina sosiala deild á stovn tann 1. august 2007, og søkja tí eftir leiðara til nýggju deildina, sum verður í Porkeri.

**Starvið**
Leiðarin skal vera við til at byggja upp sosialu deildina, so hendan verður virkin tann 1. august 2007.
Leiðarin kemur at hava ábyrgd av allari fyrisiting av deildini, herundir málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuni eru ella verða løgd til kommunurnar.
Leiðarin verður skrivari og ráðgevi hjá sosialu nevnd hjá Vágs kommunu, og ráðgevi og málsviðgerði hjá Porkeris kommunu.
Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. barnaverndina, tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystur, heilsusystur, tannlæknar, serlærarar, dagstovnar, kommunalu dagrøktina og landsmynduleikar.

Starvið er sett til 3/4 starv.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, íð er útbúgvin sum sosialráðgevi. Tó kunnu eftir umstøðunum eisini aðrir umsøkjarar lúka treytirnar, um teir hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverkið.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. august 2007. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Vágs kommunu, Petry Joensen tel. 37 30 24 ella tel. 22 87 18

Ert tú áhugað/ur?

Send eina skrivliga umsókn saman við prógvum, CV og møguligum og viðmælum til:
Vágs kommunu
Att.: Sosiala nevnd
Vágsvegur 22
FO-900 Vágur

Umsóknin skal verða okkum hendi í seinasta lagi 20. juni 2007 kl. 12.00

**Vágs kommuna**
Vágsvegur 22 • 900 Vágur
tlf 37 30 24 • vagur@vagur.fo

KEMILUX industri

# GOYMSLUFÓLK

Til goymslu okkara á Hjalla søkja vit eftir m/k til alt vanligt goymsluarbeiði so sum: innkeyp, sølu og logistik.

Dentur verður lagdur á teldukunnleika og góð samstarvsevnir.

Góð løn verður latin.

Skrivlig umsókn verður at senda.

Meira fæst at vita við at ringja til Arna Gunnarsson á tel 210931.







Mykinesgøta 1 · Postboks 1231
FO-110 Tórshavn
Tel 350830 · Fax 350831